# Ov lítil keypiorka – lágur fiskaprísur

**Formaðurin í Ráfiskaseljarafelagum og reiðarin, Jóhannus Olsen, sigur, at reglan um tey 25% av ráfiski, sum kunnu seljast av landinum, má broytast, so tað stendur skipum frítt at selja veiðina, har prísurin er bestur**

FISKAPRÍSIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Jón Brian Hvidtfeldt/Rás2*



*- Vit mugu sleppa at selja fiskin, har vit fáa besta prísin, sigur Jóhannus Olsen, reiðari og formaður í Ráfiskaseljarafelagnum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



Seinnu árini hevur ein stórur partur av føroysku flakavinnuni verið í einum aldudali. Trupult hevur verið hjá virkjunum at fáa raksturin at hanga saman, og í seinastuni er eisini komið alment fram, at stóru hallini hjá virkjunum rættiliga tyngja um likviditetin. Hetta hevur aftur gingið út yvir orkuna at bjóða seg fram í kappingini um ráfiskin, og tí hevur eftirspurningurin eftir ráfiski verið minni enn annars.

Skipa- og bátaeigarar hava merkt støðuna við minkandi eftirspurningi – í lækkandi ráfiskaprísum.

Samstundis, sum minkandi keypiorka og kapping hevur verið um ráfiskin í seinastuni, eru skipini avmarkað í at selja sína veiði uttanlands.

Sambært lógini um vinnuligan fiskiskap kunnu skipini selja í mesta lagi 25% av síni veiði uttanlands, meðan restin skal um føroysku uppboðssøluna.

Hetta halda reiðarar vera ein ov stór avmarking, um prísirnir eru betri uttanlands.

Ráfiskaseljarafelagið vil tí hava hesa avmarking í lógini burtur, og víst verður eitt nú til úttalilsir hjá Tórbjørn Jacobsen, landsstýris-









## KIA Carens

Kia Carens er ein nýggjur bilur í Kia-familjuni, sum er føddur við 7 setrum. Hesin bilurin hevur sett fullkomiliga nýggjan standard í MPV-flokkinum við 7 setrum og 5 ára trygd. Hetta er fyrst og fremst ein bilur til barnafamiljurnar og tú kanst velja millum bensin ella diesel..

**úr kr. 256.800**



Kia Picanto úr kr. 124.800



Kia Magentis úr kr. 224.800



Kia Rio úr kr. 159.800



Kia Ceed úr kr. 184.800



Kia Sportage úr kr. 270.800



Kia Sorento úr kr. 375.800

# Kia – millum heimsins fremstu bilaframleiðarar

Kia Motors hevur bygt sína egnu bilverksmiðju í Evropa og floymir nú yvir evropeiska marknaðin við rúkandi ferð. Talan er um eina bilverksmiðju, sum hevur stórar ætlanir í Evropa. Verksmiðjan er ein tann mest framkomna í øllum heiminum, og í 2007 tóku teir allan bilaídnaðin á bóli við at geva heilt upp til 7-ára garanti upp á sínar bilar. Málsetningurin hjá Kia Motors er heilt greiður. Teir skulu verða millum heimsins størstu bilframleiðararnar.

BM Berg Motors Sp/F · Staravegur 1-3 · FO-110 Tórshavn · tel 31 35 35 · www.bergmotors.fo